skemt

# Føroyar nýggjan løgmann




Ein dani løgmaður í Føroyum? Ja, tað sá ikki mætari út á heimasíðuni hjá Sjónvarpinum beint undan nýggjárinum. Gamlaárskvøld heldur løgmaður sína nýggjársrøðu til Føroya fólk, og eftir hann sleppur eisini danska drotningin á skíggjan. Onkur blandur var komin í hjá Sjónvarpinum, so Margretha Drotning alt í einum var blivin løgmaður í Føroyum .



## Amerikanski giraffurin

Á internetinum er ein mynd í umfari, sum skal vísa, hvussu giraffarnir høvdu sæð út, um teir livdu í USA. Eftir øllum at døma høvdu fastfood-keturnar klára at syrgt fyri, at hetta djóraslagið fekk eitt annað skap.

## Vónleys kavagraving



Ógvusligur kavastormur í Hope Valley í Kalifornia hevði ávirkan á sjálvt Kirkwood Mountain Restort, sum bjóðar fólki náttúruupplivingar. Tað er ivaleyst fínt við eitt sindur av kava, men máti skal verða við. Á myndini eru starvsfólk farin í holt við at grava fyri at kunna av staðið opið – men tað líkist eini vónleysari uppgávu.

# *Í rangastrúpan*

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Nýtt uppskot um flogvøll**
Kl 19:30 í kvøld verður almennur fundur um nýggjan altjóða flogvøll á Hotel Føroyum
www.Olivant.fo

**Spildurnýtt felag**
Nýggja felagið hjá Rógva Jacobsen vandi fyri fyrstu ferð í gjár.
Rás 2

**Nýbyrjari**
Rógvi til fyrstu venjingina
Vikublaðið

**Ja, faktiskt reyk helvtin**
Fleiri lið ruku í triðja umfari (av ensku steypakappingini)
www.Olivant.fo

**Til hvat annað?**
Søkt verður eftir línumanni til línuskip
Útvarpið

**So fær eingin mein av tí**
Hjáárin av medisini hildin loynilig
www.dimma.fo

**Ja, líkist akkurát**
Barack Obama líkist demokratiska avbjóðaranum
www.uf.fo

## Leyst og fast um stórt og smátt

**Nú fer Ulla Bøje Rasmussen at gera ein film um allar Føroyar. Hann skal eita "1800 meter fra fremtiden", og skal handla um tann altjóða flogvøllin, sum føroyingar mangla!**

**Skal ein seta ensk orð á valfundin á Lærarskúlanum, má tað verða "Mr. Big mistake"!**

**Nýtt politiskt hugtak: "At spyrja seg sjálvan"?**

**Vit gjalda lurtaragjald sum er. Mugu vit nú eisini gjalda mikrofon-haldaragjald?**

**Sjálvdrátturin, sum bleiv avtikin í fiskivinnuni í 1950, er nú innførdur í valstríðnum!**

**Býurin er longu plakat-fullur!**

**Burdu kanska havt passirúm í Løgtinginum, so tað var lættari at skifta flokk?**

**NSÍ - Næstan Serbiskt Ítróttarfelag**

**NSÍ hevur bæði fysioterapeut og Acupukturovic**